# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

MC Boogie:

# Hundrað motorsúkklur á Selatrað

**Leygardagin 5. mai skipaðu áhugafeløgini Føroya Ellisakfør og Føroya MC fyri einum Felagstúri, sum byrjaði í Havn. Á Selatrað varð skipað fyri ymiskum tiltøkum**

MC

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Umleið 100 motorsúkklur luttóku í felagstúrinum hjá áhugafeløgunum Føroya Ellisakfør og Føroya MC leygardagin. Hesum túrinum var tann fyrri av tveimum árligum felagstúrum hjá hesum feløgum.

Motorsúkklukoyrarnir møttust kl. 10 á Shell-støðini við Ringvegin í Havn, har Føroya Shell bjóðaði kaffi og wienerbreyð.

Kl. 11 var koyrt avstað. Fyrst ein rundtúr gjøgnum Havnina. Síðan varð koyrt norður eftir, og steðgað varð á Shell-støðini við Streymin.

Eftir ein steðg har, varð koyrt um Eiðisskarð og suður til Selatraðar, har skipað var fyri ymiskum kappingum v.m.

Á Selatrað stóð ein pylsuvognur klárur, so motorsúkklukoyrarnir kundu keypa sær okkurt lætt at eta og drekka.




*Motorsúkklukoyrarnir møttust leygarmorgunin á Shell-støðini við Ringvegin í Havn*






*Á Selatrað stóð ein pylsuvognur klárur til motorsúkklukoyrarnar*







*Umleið 100 motorsúkklur luttóku í felagstúrinum hjá áhugafeløgunum Føroya Ellisakfør og Føroya MC leygardagin*